## Vil av við Portsmouth

Tað er liðin ein mánaði, síðan Sulaiman al-Fahim keypti enska fótbóltsfelagið Portsmouth, men longu nú vil hann selja aftur. Al-Fahim hevði lovað at tveitt 400 milliónir krónur í kassan hjá Portsmouth, sum er í fíggjarligum trupulleikum, men okkurt bendir á, at al-Fahim ikki hevur pengarnar til hetta. Tí er líkt til, at hann fer at selja stóran part av felagnum aftur beinanvegin.



## Leonardo misti røddina

Venjarin hjá AC Milan, brasilski Leonardo, er í trongum skóm, tí tað hevur ikki gingið nakað serligt hjá hansara felagið higartil í hesum kappingarárinum. Um vikuskiftið rópti og skríggjaði Leonardo so nógv á sínar spælarar, at hann mest sum misti røddina, og hjálparvenjarin mátti tosa við fjølmiðlarnar eftir dystin. AC Milan fekk bert javnleik 1-1 ímóti Atalanta.

### ÍF-NSÍ 1-3 (0-0):

# NSÍ slapp í Europa

ÍF

NSÍ

**Í seinasta landskappingar-dystinum á árinum eydnaðist tað NSÍ at toga seg fram um grannarnar hinumegin Svangaskarð**




Jákup Mørk

Tá spælararnir hjá NSÍ fóru á vøllin til seinasta hálvleikin á árinum, kendu teir fortreytirnar. B68 hevði í evstu løtu mist sigurin í Gundadali, og tí vóru trý stig í Fuglafirði meira enn vanliga týðandi.

Fyri steðgin hevði talan ikki verið um tað stóra fótbóltsspælið. Vindurin var nógvur í Fuglafirði, og tað bar við sær, at dómarin í tveimum førum gjørdi av at útseta dystin, so hesin byrjaði ein tíma seinni enn dystirnar aðrastaðni í landinum. Hetta tí FSF longu tíðliga um dagin hevði heitt á dómararnar um heldur at bíða nakað við at floyta ígongd, so vandin fyri at flyta dystir til sunnudagin gjørdist minst møguligur. Ein avgerð, sum eisini hepnaðist væl, tá tað eydnaðist at gjøgnumføra alt umfarið leygardagin.




Runavíkingar bjargaðu sær í evstu løtu europiska atgongumerkið, tá teir vendu 0-1 til 3-1 í Fuglafirði

savnsmynd

### Søtur sigur

Tað var tó um reppið, at alt fór í fisk hjá NSÍ. Fuglfirðingar høvdu nevnliga ikki ætlanir um at lata nakað sum helst fyri einki, og tá Poul Ennigarð stútaði hornaspark í netið, stóð veruliga á hjá runavíkingunum.

Men tá var tað, at ungu landsliðsspælararnir hjá runavíkingum traðkaðu í karakter. Johan Troest Davidsen javnaði eftir hornaspark, og Einar T. Hansen legði NSÍ framum – somuleiðis eftir hornaspark.

So var NSÍ á sigurskós, og tá Bogi Løkin segði farvæl og takk á hesum sinni við málinum til 3-1, kundi kassameistarin hjá NSÍ draga andan lættari. Sjálvandi skal peningur eisini nýtast til ferðing og fyrireiking, men tær 680.000 krónurnar, sum eitt pláss í Europa gevur, koma væl við hjá runavíkingum, sum í ár hava verið í hørðum stríði við Víking og B68 um europisku billettirnar. Og tað mundi kennast eyka søtt, at tað akkurát vóru grannarnir av Toftum, sum at enda máttu boyggja seg í hesum stríðnum.

## Bestubitar úr 3. hálvleiki

**Eisini í seinastu útgávuni av 3. hálvleiki í 2009 vóru SMS-boð frá lurtarum partur av undirhaldinum. Niðanfyri prenta vit bestu SMS'ini, sum komu inn leygardagin, og tað besta av hesum – sum er prentað ovast á listanum – verður lønt við einum gávukorti frá Carello**

*» Ein heilsan til sudringar og sandingar:-) fai tykkum ikki undirsjoartunnil, so enda tit sum kì og 07 vestur !!!«*

*» Ei ta er naka mess, ta at vit senda sms. Vit brúka horn og klón, og hartil vit seta vára vón, at okra sms verður funni, so vit hoyra um stund at vit hava VUNNIÐ.«*

*» Í Hb drekka tey gull øl, hjá Kí drekka tey grav øl:-)«*

*» Mc OUT dámdi ikki 23man. Toftamenn í sorg, aftaná beinleiðis horna frá Borg.«*

*» Haldi at B71 skal sleppa at spæla sinar heimadystir i Klaksvik komandi ar, so sleppa teir at koyra igjøgnum ein undirsjovartunnil:) vh Jarvin«*

*» Tad veru ongantid at eg gevi upp. Ongantid noy. Eg komi so at stulda tykkum alt næsta ar. Koyr a ki. Vit elska tykkum. Blatt er blatt, blatt er gott.«*

*» Lat nsi endeliga gledast um bronsina vit vunnu teir i runavik vit voru nogv betre enn teir«*

*» Vit skullu nokk minna HB a næsta ar ta id teir bliva nummar 2, at nummar 2 er einki«*